

# ÁLIT UM SETANARVIÐURSKIFTI HJÁ AÐALSTJÓRUM

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ... 3
Arbeiðssetningur ... 4
Samandráttur av álitinum ... 5
Søguligt bakstøði og fyriskipanarligar reglur ... 6
Hægri fyriskipanarligar reglur um tænastumenn ... 7
Føroyska skipanin við aðalstjórastørvum ... 8
Innihaldið í aðalstjórastarvinum ... 8
Galdandi lógarreglur um setan av tænastumonnum í dag ... 9
Samanberingar við londini rundan um okkum ... 11
Danmark ... 11
Grønland ... 12
Ísland ... 13
Noreg ... 13
Fyrimunir og vansar við skipanini, sum aðalstjórar verða settir eftir í dag ... 15
Lýsing av samrøðutilgongd ... 15
Høvuðsevnir frá samrøðum ... 15
Høvuðsevni 1: Týdningurin av tænastumannasetanini ... 15
Høvuðsevni 2: Áramálssetanir ... 17
Høvuðsevni 3: Lønarviðurskifti ... 20
Høvuðsevni 4: Almenna í mun til tað privata ... 21
Høvuðsevni 5: Alternativ til aðalstjórastarvið ... 22
Høvuðsevni 6: Hugleiðingar um skipanina og møguleikar fyri rotering ... 23
Samanumtøka av fyrimunum og vansum ... 25
Tilmæli nevndarinnar ... 27

Við hesum letur nevndin, sum sett varð at kanna setanarviðurskiftini hjá aðalstjórum, úr hondum álit.

Tórshavn, tann 11. desember 2023

Sólja í Ólavsstovu

forkvinna

Eyðfinnur Jacobsen

Kristoffur Laksá

/Rakul Svabo Róadóttir,

skrivari

# Inngangur

Stjórnarráðini vórðu sett á stovn í 1997, tí mett varð, at landsstýrisfólk skuldu hava hvør sína fyrisiting, tá ið farið varð frá kollegialum stýri til ráðharrastýri. Til einstøku stjórnaráðini eru aðalstjórar settir. Setanarviðurskifti hjá aðalstjórum í Føroyum eru ongantíð vorðin endurskoðað, síðan skipanin varð sett í verk í 1997.

Við seinasta stjórnarskifti vaks talið á stjórnarráðum úr sjey upp í níggju. Samstundis legði ein av verandi aðalstjórunum frá sær. Sum úrslit av hesum skulu tríggir nýggir aðalstjórar setast í næstum. Í hesum sambandi hevur løgmaður, eftir tilmæli frá føroysku limunum í dómaratilnevningarnevndini, sett eina óhefta nevnd at endurskoða setanarviðurskifti hjá aðalstjórum. Nevndin skal vísa á styrkir og veikleikar í verandi skipan og orða eitt tilmæli um, hvørjar broytingar møguliga kunnu gerast.

Leikluturin sum aðalstjóri setur krøv um álit og verju. Í stuttum hevur aðalstjórin dagliga ábyrgd av, at stjórnarráðið virkar til fulnar og er fremsti fakligi ráðgevi hjá landsstýrisfókinum. Aðalstjórin skal eitt nú ráðgeva í politiskum viðurskiftum, vera mótvekt hjá landsstýrisfólkinum fyri at tryggja haldgott grundarlag og gera politisk hugskot til veruleika.

Við støði í hesum byggir skipanin um aðalstjórasetanir á, at aðalstjórar eru væl vardir sum tænastumannasettir. Tað hevur eitt nú við sær, at tænastumaðurin er væl tryggjaður, tá ið hann verður sagdur úr starvi av orsøk, sum hann ikki er sekur í sjálvur, ella um starvið verður broytt. Her verður fyrst og fremst tryggjað við eftirlønarrættindum og í heilt ávísum førum við trý ára løn við starvsenda. Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins verður sagt, at tænastumaður eftir hesi lóg er tann, ið settur er í landsins tænastu eftir reglunum í hesi lóg.

Nevndin hevur skipað eina fakliga og luttakandi tilgongd, sum er sett saman av søguligum tilfari, lýsing av støðuni í londunum uttan um okkum og samrøðum við 15 viðkomandi hoyringspartar.

Arbeiðið er skipað í fimm høvuðspartar:

- Søguligt baksýni og fyriskipanarligar reglur
- Aðalstjórastarvið í Føroyum í dag
- Samanberingar við londini uttan um okkum

- Fyrimunir og vansar við skipanini í dag
- Tilmæli um broytingar í verandi skipan

Arbeiðið er skipað við støði í søguligum tilfari og einari lýsing av, hvussu skipan við aðalstjóra er sett saman og virkar, sum støðan er. Nevndin hevur havt 15 samrøður við viðkomandi hoyringspartar og viðger yvirskipaðu økini, ið ganga aftur í samrøðunum. At enda kemur nevndin við tilmæli um, hvørjar møguligar broytingar kunnu gerast fyri at tryggja eina skynsama skipan, sum hóskar til samtíðina.

Tilmælið verður latið løgmanni at taka støðu til.

Í nevndini hava sitið Sólja í Ólavsstovu, forkvinna, Eyðfinnur Jacobsen, nevndarlimur, og Kristoffur Laksá, nevndarlimur. Rakul Svabo Róadóttir, fultrúi á Løgmansskrivstovuni, hevur verið skrivari hjá nevndini.

## Arbeiðssetningur

Á landsstýrisfundi 18. apríl 2023 fekk løgmaður undirtøku í landsstýrinum fyri at seta eina nevnd at kanna setanarviðurskiftini hjá aðalstjórum.

Arbeiðssetningurin hevur verið at:

- Lýsa, hvussu aðalstjórar eru settir í Íslandi, Grønlandi, Noreg og Danmark, m.a. viðvíkjandi setanartreytum og løn
- Lýsa aðalstjórastarvið
- Lýsa yvirskipaðu grundina til at hava tænastumenn og søguligu bakstøði fyri hesum
- Lýsa hvørjar hægri fyriskipaðar reglur eru í grundlóg, heimastýrislóg og stýrisskipanarlóg um tænastumenn
- Lýsa søguliga, í hvønn mun tænastumenn hava verið brúktir í Føroyum eftir 1948
- Lýsa galdandi lógarreglur og praksis viðvíkjandi setan av tænastumonnum í dag
- Lýsa fyrimunir og vansar við skipanini í dag
- Koma við tilmæli um møguligar broytingar av galdandi skipan

Í arbeiðinum skuldi nevndin í sínum tilmælum umframt at leggja áherðslu á setanartreytir og løn eisini leggja áherðslu á viðurskifti og umstøður, sum stjórarnir virka undir, og hvussu tær kunnu betrast, soleiðis at karmarnir fyri almennari leiðslu verða styrktir.

## Samandráttur av álitinum

Við støði í samlaða arbeiðnum mælir nevndin til, at hildið verður fast í tænastumannasetan av aðalstjórum innan fyri verandi lógarkarmar og setanartreytir. Tó mælir nevndin til ta skipanarligu broyting, at allar nýsetanir av aðalstjórum verða sum áramálssettar setanir og ikki sum fastar setanir, sum verandi skipan ger. Harafturat heldur nevndin, at ein samanrenning millum eina natúrliga roteringsskipan millum ráð og áramálssetanir kann vera við til at geva størri dynamikk og fleksibilitet í skipanini.

Sum arbeiðstilgongd í álitinum hevur nevndin skipað eina fakliga og luttakandi tilgongd, sum er sett saman av søguligum tilfari, lýsing av støðuni í londunum kring okkum og samrøðum við 15 viðkomandi hoyringspartar.

Setanarviðurskifti við aðalstjórum eru ongantíð áður endurskoðað. Eftir arbeiðið hjá nevndini eru yvirskipaðar niðurstøður staðfestar. Eitt nú er greitt, at:

- Tað er rætt at halda fast í verandi tænastumannasetan og treytum
- Verandi aðalstjóraskipan er ov stirvin
- Greið undirtøka er fyri, at aðalstjórar verða settir í áramálssett størv
- Greið undirtøka er fyri einari natúrligari rotatiónsskipan fyri aðalstjórar

Í úrslitinum frá arbeiðinum hjá nevndini er greitt, at trygdin við tænastumannasetanini hevur stóran týdning. Tí leggja hoyringspartar dent á, at vit eiga at halda fast við hesar setanartreytir við tænastumannasetan. Tó metti nógv tann størsti parturin av luttakarunum í samrøðunum, at betri er at seta aðalstjórar upp á áramál heldur enn fastar setanir. Luttakararnir sóu fyrimunir fyri skipanina í sambandi við, at áramálssetanir kunnu vera við til at geva størri dynamikk og fleksibilitet í skipanina. Nógvir luttakarar vóru á einum máli um, at eftir tíggju ár vóru stór líkindi fyri, at aðalstjórin ikki hevði nøktandi meira nýtt at geva í starvinum.

Sambært einum størri parti av hoyringspørtunum, hevur løn ikki avgerandi leiklut fyri aðalstjórastarvið. Heldur er størsti parturin á einum máli um, at tað hevði verið gott fyri skipanina, um hon var meira dynamisk. Tað kann eitt nú vera við einari natúrligari roteringsloysn, sum landsstýrisfólk, aðalstjórar og starvsfólk vóru greið um við starvsbyrjan hjá nýsettum aðalstjórum. Tó, fyri at tryggja støðufesti og samanhang í skipanini, eiga roteringar ikki at fylgja valinum ella stjórnarskiftinum. Eisini er undirtøka fyri at hugsa eina tílíka loysn inn í samlaða embætisverkið soleiðis, at tað gerst natúrligari hjá embætisfólkum eisini at rotera millum ábyrgdarøkir, ráð og leiklutir.

## Søguligt bakstøði og fyriskipanarligar reglur

Heitið tænastumaður í Danmark kom við tænastumannalógini frá 1919. Áðrenn heimastýrið vórðu fólkaskúlalærarar, læknar, prestar og onnur sett sum tænastumenn eftir danskari tænastumannalóg. Talið á tænastumonnum í Danmark lækkaði nógv í 1990'unum, og síðan 2000 hevur danski staturin avmarkað tænastumannasetanir til størv í rættarskipanini, løgregluni, verjuni og ovastu leiðslu í statsfyrisitingini.

Sambært stýrisskipanarlógini frá 1948 var tað landsstýrið, sum sambært lóg skuldi seta tænastumenn at røkja embætisverkið hjá landinum og við lóg áseta løn og eftirløn teirra. Føroyska heimastýrið (landið) hevur tó, eins og Danmark í 1990'unum og í tíðini aftaná, avtikið flestu tænastumannastørvini. Eitt nú í fólkaskúlanum, heilsuverkinum og innan fyri námsfrøðina. Seinastu árini hevur landið mest sum einans sett aðalstjórar og prestar sum tænastumenn.

Fyrsta løgtingslógin, sum nágreiniliga ásetti treytir hjá tænastumonnum, var løgtingslóg nr. 31 frá 18. mai 1961 um tænastumenn landsins. Frammanundan høvdu løgtingslóg nr. 1 frá 31. desember 1948 um lønviðbót tænastumanna og løgtingslóg nr. 1. frá 25. februar 1953 um eftirløn og eftirsitiløn tænastumanna landsins verið í gildi. Báðar lógirnar viðgjørdu einans løn og eftirløn tænastumanna landsins.

Ikki fyrr enn í 1961 ásetti landið við lóg nágreiniliga skyldur og rættindi hjá tænastumonnum. Tey, sum fyrireikaðu uppskotið, høvdu serliga havt viðurskiftini í Danmark og Íslandi at samanbera við. Henda lóg lýsti tænastumann landsins sum ein, ið hevur varandit lívsyrki í tænastu landsins, og sum eftir hesi lóg verður lønt við fastari árligari lønarupphædd. Aspirantar vóru ikki roknaðir sum tænastumenn.

Í núgaldandi lóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins er tænastumaður hann, ið settur er í landsins tænastu eftir reglunum í hesi lóg.

Talan kann vera um:

1) Fasta setan

2) Royndarsetan við fastari setan í hyggju seinni

3) Setan upp á áramál

Eftirlønir tænastumanna landsins eru nú ásettar í einari lóg fyri seg, lóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir.

Eitt eyðkenni fyri tænastumannastørv er, at tænastumaður hevur ikki rætt til at fara í verkfall. Hinvegin er tað so, at um starvið verður niðurlagt og

tænastumaðurin ikki fær í boði annað hóskandi starv, hevur hann rætt til uppsøgn og løn í trý ár og síðan eftirløn.

Grundgevingin fyri at seta fólk sum tænastumenn var helst, at tað almenna á tann hátt tryggjaði sær størri trúskap og við hesum tryggjaði forsvarligari rakstur av almennum virksemi og óheftni. Hetta var eitt nú galdandi við dómarum, boðanarfrælsi (t.d. hjá prestum) og frælsi viðvíkjandi arbeiðshátti (t.d. hjá lærarum).

Sum eitt eindømi ásetur tænastumannalógin, at tænastumaður skal bæði í og uttan fyri tænastu umboða atburð, sum hóskar til starvið. Hetta er krav um tign (dekorum) bæði í og uttan fyri tænastu, sum lóggávan einans setur tænastumonnum. Brot á hesa skyldu verður roknað sum tænastumisbrot og kann hava setanarligar avleiðingar við sær.

## Hægri fyriskipanarligar reglur um tænastumenn

§ 27 í grundlógini sigur, at reglur um setan, uppsøgn, flyting og eftirløn av tænastumonnum verða ásettar við lóg. Viðmerkt verður, at staturin hevur brúk fyri góðum og álítandi embætisfólki, sum ikki letur seg mutra. Tí er tørvur á, at nøkur av embætisfólkunum í ovastu størvunum verða sett í starv sum tænastumenn við serliga vardum reglum viðvíkjandi uppsøgn og eftirløn.

Í heimastýrislógini er undir lista A, føroysk sermál, ásett, at føroyska heimastýrið setur egnar tænastumenn og setanartreytir teirra. Í stýrisskipanarlógini frá 1948 var ásett í § 11, at landsstýrið setti og loysti úr embæti teir tænastumenn, sum samsvarandi løgtingslóg standa undir føroyska heimastýrinum.

Ásetingin varð tó ikki endurtikin í stýrisskipanarlógini frá 1994. Í álitinum hjá nevndini, sum gjørdi uppskot um stýrisskipanarlógina frá 1994, stendur, at nevndin heldur ikki, at tað er neyðugt at endurtaka § 11 í stýrisskipanarlógini um tænastumannaviðurskifti. Hetta kann verða ásett við løgtingslóg, og at landsstýrið tilnevnir tænastumenninar, fylgir av, at landsstýrið hevur útinnandi valdið.

# Føroyska skipanin við aðalstjórastørvum

## Innihaldið í aðalstjórastarvinum

Aðalstjórin er fremsti ráðgevi hjá landsstýrisfólkinum. Tað merkir, at aðalstjórin ráðgevur í fakligum spurningum umframt at ráðgeva í politiskum og taktiskum viðurskiftum í sambandi við, at mál hjá landsstýrinum kunnu fremjast.

Aðalstjórin skal tryggja, at landsstýrisfólkið fær góða ráðgeving frá serfrøðingum og øðrum starvsfólkum í stjórnarráðunum, og at avgerðir eru lógligar og rættar. Harafturat skal hann tryggja landsstýrisfólkinum góða dagliga tænastu í øllum tiltøkum og spurningum, sum landsstýrisfólkið fær.

Aðalastjórin er somuleiðis ovasti stjóri hjá fyrisitingini og avvarðandi ráði. Tað merkir, at aðalstjórin hevur ábyrgd av at tryggja eina vælvirkandi fyrisiting við støði í leiðslu og úrslitum og er strategiskt við at menna uppgávuloysnina hjá stjórnarráðnum.

Aðalstjórin hevur yvirskipað eftirlit við stovnum, ið vísa til ráðið. Tað merkir, at aðalstjórin skal tryggja, at endamálið við stovninum verður rokkið, og hava eftirlit við, at stovnarnir arbeiða innan fyri ásetta fíggjarkarmin.

Við støði í leiklutinum hjá aðalstjóranum er týdningarmikið, at landsstýrisfólkið og aðalstjórin hava fult álit sínámillum. Tey eiga at hava eina felags fatan av leiðslurúminum hvør hjá øðrum soleiðis, at tey altíð vita hvør av øðrum í gerandisdegnum.

Við støði í lýsing av góðari ovastu leiðslu í almenna geiranum skal aðalstjórin:

- Greiða sítt leiðslurúm við landsstýrisfólkið
- Taka ábyrgdina av, at alt stjórnarráðið virkar í samsvari við politisku málini
- Menna eina organisatión, sum hevur áhuga og kann ávirka umheimin
- Menna eina organisatión, sum virkar sum partur av einum samanhangandi almennum geira
- Krevja, at organisatiónin hevur fokus á úrslit og ávirkan
- Tryggja stóru myndina og arbeiða strategiskt við at menna uppgávuloysnina hjá stjórnarráðnum
- Brúka sín rætt og sína skyldu at leiða organisatiónina
- Sýna yrkisligan og persónligan integritet
- Verja legitimitetin hjá tí almenna og fólkaræðisligu virðini

Eingin neyv lýsing er av eftirlitsskylduni hjá aðalstjórum. Tað vil siga skylduni at hava eftirlit við, at stjórar á undirliggjandi stovnum hava tamarhald á, at stovnurin fakliga og fíggjarliga verður nóg væl rikin.

## Galdandi lógarreglur um setan av tænastumonnum í dag

Eitt av eyðkennunum við tænastumannasetanini er, at tænastumaðurin er væl tryggjaður, tá ið hann verður sagdur úr starvi av orsøk, sum hann ikki er sekur í sjálvur, ella um starvið verður broytt. Hetta verður fyrst og fremst tryggjað við eftirlønarrættindum og í heilt ávísum førum við trý ára løn við starvsenda. Harafturat kann tænastumaður ikki fáa álagt nakra agarevsing uttan at tænastuligt forhoyr hevur verið frammanundan.

Eftir § 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins verður sagt, at tænastumaður eftir hesi lóg er tann, ið settur er í landsins tænastu eftir reglunum í hesi lóg.

Tænastumannafelagið hevur sambært § 31 í lógini rætt at samráðast um lønar- og starvstreytir tænastumanna við undantaki av viðurskiftum, sum ásett eru við lóg ella viðvíkja uppgávunum, skipanini ella fólkatørvinum hjá umsitingini. Í førum, har semja ikki er millum partarnar, kann landsstýrið við støði í grein 32 leggja fram serligt lógaruppskot.

Grundleggjandi reglurnar um tænastumenn landsins eru ásettar í lógini. Tað eru eitt nú skyldur og rættindi tænastumanna, heilsustøða og fráfaringaraldur. Í lógini er tó ásett, at annar fráfaringaraldur kann verða avtalaður.

Avtalur eftir § 31 verða gjørdar um lønar- og setanarviðurskifti, men ikki um normeringstøl. Viðvíkjandi normering verður víst til játtanarskipan landsins 5.2.1.1. Starvsfólk, sum er orðað soleiðis:

*Landsstýrisins starvseftirlit førir við sær, at ávís størv skulu góðkennast áðrenn tey verða stovnað. Starvseftirlitið fevnir um tænastumannastørv og øll onnur størv við eini løn svarandi til tænastumannastørv í 36. lønarflokki ella hægri.*

Bæði Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum og Løgmansskrivstovan skulu góðkenna flokking av stjórastørvum og setanartreytir. Um Fíggjarmálaráðið og Løgmansskrivstovan eru ósamd, verður málið lagt fyri løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum til støðutakan. Starvið verður eisini flokkað í samráð við viðkomandi felag.

Galdandi er, at viðkomandi landsstýrisfólk setur tænastumannastørv, og aðalráðini avgreiða gjaldsordrar. Í flestu førum skrivar Lønardeildin setanarskrivini.

Serliga viðvíkjandi tænastumannastørvum er neyðugt, at strangt eftirlit er við normeringini, tí at landskassin verður bundin til at rinda eftirløn til tænastumannin (umframt hjúnafelaga og børn), tá ið tænastumaðurin fer úr starvi. Talan er ofta um eini 20-30 ár fram í tíðina.

## Samanberingar við londini rundan um okkum

Londini rundan um okkum hava sum heild væl hægri lønarlag. Hetta er somuleiðis galdandi fyri aðalstjórar. Í londunum rundan um okkum eru tey í stóran mun farin frá fastsettum setanum til áramálssetanir, tá ið talan er um aðalstjórar. Setanarmodellini í londunum eru ymisk, men eru merkt av áramálssetanum við áramálsískoyti.

### Danmark

Í Danmark eru aðalstjórar settir sum tænastumenn, og lønarlagið liggur millum 1,7 og 2,4 milliónir krónur árliga.

Mest sum allir stjórar í danska almenna geiranum eru gjøgnum tíðina settir eftir einum av hesum setanarmøguleikum:

- Tænastumannasetan
- Sáttmálasetan eftir sáttmála fyri akademikarar
- Sáttmálasetan við rammuavtalu

Sum part av øllum trimum møguleikum er møguleiki fyri fastari setan, tíðaravmarkaðari ella tænastumannasetan. Seinastu árini er danska umsitingin farin frá tænastumannasetanum til áramálssetanir sambært sáttmála..

Í 2009 tók Finansministeriet stigið víðari og gjørdi sáttmálasetanir við rammuavtalum. Loysnin gav víðari møguleikar fyri sáttmálasemjur og øktan fleksibiltet. Ætlanin bleiv sostatt, at henda loysn kom í staðin fyri tænastumannasetanir og vanligar sáttmálasetanir av stjórum í almenna sektorinum.

Hugtakið við áramálssetanum er sostatt komið sum ein háttur at geva størri fleksibiltet í sambandi við tænastumannasetanir. Men áramálssetanir kunnu í dag brúkast frítt bæði í sambandi við vanligar sáttmálasetanir og sáttmálasetanir við rammuavtalum.

Aftur at áramálssetanini verður givið eitt serligt áramálsískoyti. Hetta er at rokna sum eitt váðaískoyti fyri tíðaravmarkaðu setanina.  Um viðkomandi stjóri er tryggjaður eina fasta setan, tá ið áramálssetanin er liðug, kann áramálsískoytið verða ávirkað av hesum. Vanliga liggur ískoytið millum 18 og 25%.

Í Danmark er tað setanarnevndin hjá stjórnini (regeringens ansættelsesudvalg), ið saman við avvarðandi ráðharra tekur avgerð um, hvør skal setast í aðalstjórastarv. Mannagongdin skal sambært Moderniseringsstyrelsen tryggja:

- Eins rekruttering í øllum statinum
- Ein breiðan og kvalifiseraðan umsøkjaraskara
- At hin best egnaði kandidaturin fær starvið í boði
- Eitt greitt væntanarsamsvar um førleikakrøv
- Vegleiðing til tilgongd og uppgávur hjá setanarmyndugleikanum

Avvarðandi ráðharri setur í starv nýggjan aðalstjóra, tá ið starvið er tøkt. Tað eru tó fleiri partar aftrat avvarðandi ráðharra og hansara stjórnarráði (ressortministerium), sum eru partar av rekruttering av aðalstjórum. Sum grundarlag fyri meting hjá ráðharranum og fyrireikandi setanarbólki av kandidatum verður gjørdur ein profilur fyri aðalstjórastarvið (departementschefprofil). Í profilinum eru rekrutteringsmetingarstøði, aðalstjórauppgávur, viðkomandi royndir, og førleikar verða lýstir.

## Grønland

Í Grønlandi eru aðalstjórar áramálssettir, og lønarlagið liggur millum 980.000 og 1,2 milliónir krónur árliga.

Vanliga er áramálssetanin fýra ár við møguleika at leingja við trimum árum, áðrenn aðalstjórastarvið verður lýst leyst aftur. Ein grund til hesa loysn er, at landsstýrisfólk í Grønlandi vilja hava møguleikan at velja sín aðalstjóra.

Aðalstjórar í Grønlandi eru ikki settir sum tænastumenn. Nýsettir aðalstjórar eru sáttmálasettir. Tó varðveita aðalstjórar, sum upprunaliga eru settir sum tænastumenn, sína tænastumannasetan.

Lønarmunur er millum ráðini, og allir aðalstjórar fáa eitt mánaðarligt ískoyti fyri áramálssetan. Hetta ískoytið er ymiskt frá aðalstjóra til aðalstjóra. Argumentið fyri hesum ískoyti er í stóran mun, at aðalstjórar eru í politiskt útsettum størvum.

Í Grønlandi er tað landsstýrið, sum tekur avgerð um setan av aðalstjóra grundað á tilmæli frá avvarðandi landsstýrismanni. Landsstýrismaðurin fær tilmæli frá setanarbólki.

Aðalstjórasetanir eru fevndar av rundskrivi um setanir í grønlendska Sjálvstýrinum, sum inniber, at setan av aðalstjóra er ein tilgongd, sum skal fylgja somu treytum sum aðrar setanir í Sjálvstýrinum.

Tá ið talan er um aðalstjórasetan, verður heitið *bedømmelsesudvalg* nýtt, tí sjálv avgerðin um setan verður tikin á fundi í landsstýrinum (Naalakkersuisut). Tað er tí ikki setanarbólkurin, sum kann taka avgerð um setanina, men hann metir og gevur tilmæli til avvarðandi landsstýrismann, sum síðan ger tilmæli og leggur tað fyri landsstýrið. Hetta er eitt upprit, sum aðalstjórin í landsstýrisformansins stjórnarráði ger saman við avvarðandi landsstýrismanni. Tað er landsstýrið, sum tekur avgerð um setan við støði í uppritinum.

## Ísland

Lønarlagið hjá aðalstjórum í Íslandi liggur í dag millum 95.000 og 192.000 krónur mánaðarliga.

Aðalstjórar eru at rokna sum embætisfólk og eru áramálssettir fimm ár í fyrsta umfari. Stjórnin hevur heimild at lýsa embætini fimta hvørt ár, men tá skal aðalstjórin fáa kunningina við hóskandi freist. Um hetta ikki verður gjørt, verður setanin longd við fimm árum.

Aðalstjórar kunnu flytast millum ráð og stovnar eins og onnur embætisfólk. Aðalstjórar fáa óskerda løn alla setanartíðina. Tey kunnu tó nokta at verða flutt og fara tá á eftirløn.

Í íslendsku skipanini er tað avvarðandi ráðharri, sum tekur avgerð um, hvør skal setast í starv. Hann skal seta trímannaðan bólk at meta um umsøkjararnar. Tilmælið er vegleiðandi. Forsætismálaráðið ger reglur um setanarbólkin.

Í Íslandi er lóg um landsfyrisitingina, sum m.a. hevur ásetingar um at seta aðalstjóra. Tað er avvarðandi ráðharri, sum setur í starv aðalstjóra og deildarstjórar (Head of Department). Áðrenn hann tekur avgerð og setur í starv, skal hann seta trímannaðan bólk at meta um kandidatarnar. Niðurstøðan hjá bólkinum er vegleiðandi fyri setanina. Forsætisráðharrin ger reglur fyri setanarbólkin, hvussu bólkurin verður mannaður, mannagongdir v.m.
Tað tykist, sum ráðharrin hevur stórt avgerðarrúm í sambandi við at seta aðalstjóra.

## Noreg

Í Noregi eru ovastu stjórarnir politiskt settir. Landið hevur ein "statssekretær," sum er politiskt útnevndur. Tað er vorðið vanligt seinastu árini at hava fleiri statssekreterar í einum stjórnarráði, og teir umboða vanliga stjórnarflokkarnar og ymisk geografisk øki.

Av tí at skipanin í Noregi grundleggjandi er øðrvísi enn okkara, hevur nevndin valt ikki at brúka Noregi sum grundalag fyri samanberingini.

## Fyrimunir og vansar við skipanini, sum aðalstjórar verða settir eftir í dag

### Lýsing av samrøðutilgongd

Nevndin hevur havt samrøður við aðalstjórar, fyrrverandi aðalstjórar, løgmansstjóra, fyrrverandi løgmansstjóra, Lønardeildina og fyrrverandi landstýrisfólk. Talan er um 15 samrøður samanlagt.

Áðrenn samrøðurnar fingu allir luttakarar sendandi kunning um arbeiðið og eitt samrøðuskjal, sum virkaði sum yvirskipað ramma fyri samrøðuna. Hetta merkir, at samrøðurnar tóku støði í spurningunum í samrøðuskjalinum. Skjalið liggur sum fylgiskjal í álitinum. Tó fingu luttakarar í stóran mun møguleika at leggja dent á økir, ið tey serliga vildu fáa fram í samrøðuni. Samrøðurnar vóru allar navnloyndar, og tilfarið frá samrøðunum er brúkt sum partur av samlaðu endurskoðanini hjá nevndini av setanarviðurskiftum hjá aðalstjórum.

Tænastumannafelagið hevur somuleiðis fingið møguleika at koma til eina samrøðu og greiða frá sínum sjónarmiðum, men valdi ikki at luttaka.

### Høvuðsevnir frá samrøðum

Við støði í samrøðunum vóru høvuðsevnir, ið serliga gingu aftur hjá ymisku luttakarunum. Høvuðsevnini kunnu býtast í fimm partar og eru flokkað niðanfyri.

#### Høvuðsevni 1: Týdningurin av tænastumannasetanini

Aðalstjórar í Føroyum hava altíð havt somu setan sum tænastumenn. Setanin fevnir um lønarflokk 39 umframt eina aðalstjóraviðbót. Einstøk undantøk eru, men sum meginregla er hetta setanartreytin fyri aðalstjórar. Í einstøkum føri við áramálssetan liggur ein viðbót, sum er 20% av samlaðu lønini. Eftirlønin verður tá útgoldin eftir vanligum treytum, tá ið viðkomandi er vorðin 60 ár.

Viðurskifti við aðalstjórasetanum eru ongantíð endurskoðað. Sum heild hevur lítið og einki kjak verið um, at aðalstjórar í Føroyum eru tænastumannasettir. Dømi um endurskoðan av tænastumannasetanum er hjá yvirlæknum. Í dag er á leið helvtin av yvirlæknum sáttmálasett og hin helvtin tænastumannasett. Yvirlæknar, ið eru settir seinastu árini, eru allir sáttmálasettir.

Samrøðurnar hjá nevndini geva ábending um, at tænastumannasetanin gevur eina vissa trygd í starvinum sum aðalstjóri. Víst verður serliga til javnvágina hjá aðalstjórum ávikavist at tryggja politisk mál hjá avvarðandi landsstýrisfólki og samstundis veita hóskandi mótvekt og tryggja munagott grundarlag fyri avgerðum og tilgongdum. Aðalstjórar mugu tora at standa móti stóru megini og kunna seta viðkomandi og grundað krøv. Samanumtikið kemur fram í samrøðunum, at Tænastumannalógin er mótstøðufør í tann mun, at hon er gott mótspæl ímóti politisku skipanini. Hon verjir aðalstjóran væl, og tað er gott, tí hon gevur tryggleika í starvinum. Starvið skal vera væl vart, og ein aðalstjóri skal kunna siga sína erligu meining.

Ein luttakari lýsir leiklutin soleiðis: ”*Leikluturin sum aðalstjóri er at vera sum lús millum tvær negl. Tú stendur millum landsstýrisfólkið og embætisverkið. Tað vil siga, at tú stendur millum tað fakliga og tað politiska.*” Ein annar luttakari sigur soleiðis: ”*Tað er týdningarmikið, at mann hyggur at, hvør uppgávan hjá tær er sum aðalstjóri. Tað er týdningarmikið at leggja dent á at vera meira visionerur og hugsa størri tankar. Tað kann vera, at tað er gott at halda fast um tænastumannasetanina, tí tað skapar ein tryggleika. Her hugsi eg tryggleika fyri aðalstjóran, men ikki minst fyri skipanina. At mann varðveitir kontinuitet og vitan í skipanini.*”

Nakrir av luttakarunum taka fram, at ein áramálssetan møguliga kann veita somu trygd, men at kjakið tá ofta heldur hevur snúð seg um lønarviðurskifti enn um trygdina í starvinum ella hevur verið fyri at skapa dynamikk í skipanini.

Luttakaranir halda sum heild, at tað er rætt at halda fast í tænastumannasetanini. Sum útgangsstøði er eitt av argumentunum, at um treytirnar við tænastumannasetanini ikki vóru, hevði lønarlagið ikki verið nøktandi. Tó, argumentið, ið vigaði mest til samrøðurnar, var trygdin í starvinum.

Fleiri av samrøðunum vísa tó á vansan við, at tænastumannasetanin kann vera við til at gera skipanina ov stirvna, eitt nú tá nýggj landsstýrisfólk koma. Um landsstýrisfólk fáa ein aðalstjóra, sum tey ikki eru nøgd við, leggur skipanin ikki upp til nakran einfaldan valmøguleika.

Í einstøkum samrøðum varð tó staðfest, at frá politiskari síðu er ikki ætlanin at avtaka tænastumannaskipanina, tí aðalstjórar skulu hava trygdina og verjuna, sum skipanin gevur.

Nógvar av samrøðunum vísa somuleiðis á, at tað serliga eru tøttu viðurskiftini í Føroyum, sum spæla inn viðvíkjandi trygdini við tænastumannasetanum. Her verður serliga víst á umskarandi leiklutir, sum aðalstjórar hava viðvíkjandi eitt nú arbeiðslívi og privatlívi. Tøttu viðurskiftini kunnu gera tað trupult at halda fast í ávísari mótvekt og áskoðan, um trygdin við tænastumannasetanini ikki er til staðar.

Ein greiðir soleiðis frá:"*Í Føroyum er sera stutt frá gólvinum og til landsstýrisfólkið. Tey, sum eru á gólvinum, eru eisini meiningsdannarar og politisk áhugað – og lítla støddin í Føroyum ger tað ikki lættari. Og serliga tí, at helvtin livir á Facebook og ger sína meining sjónliga har. Og tað er farligt. Tað hevur mann ikki í øðrum londum, men í Føroyum eru 90% á Facebook.*"

Harumframt verður víst á trýstið, ið leikluturin sum aðalstjóri hevur við sær. Tá viga setanarviðurskiftini við tænastumannasetanini væl upp ímóti nógvu arbeiðstímunum og trýstinum sum heild.

Samrøðurnar vísa eisini á veikleikar við tænastumannaskipanini. Ein av luttakarunum sigur soleiðis: *"Tað er eisini ein veikleiki í skipanini, at tænastumannaskipanin leggur upp til eitt lívlangt tænastulív. Tað merkir, at jú seinni tú kemur inn í skipanina, jú meira fert tú at hugsa um pensjón. Tað kundi mann farið inn og broytt nakað í. Eitt nú kundi mann farið inn og broytt hetta til vanliga pensjónsuppsparing í staðin fyri tænastumannaeftirøn. Soleiðis er t.d. í Løgtinginum. So kundi mann koyrt lønina upp og lagt eina vanliga eftirlønaruppsparing inn."*

Í samrøðunum verður eisini víst á, at sum heild er skilabest er at finna eina skipan, sum tryggjar, at aðalstjórar ikki enda við at sita fyribilssettir í longri tíðarskeið. Í staðin skuldi verið ein skipan, sum tryggjar, at søkt verður eftir aðalstjóra innan fyri fáar vikur og ikki fleiri mánaðar. Eitt av argumentunum fyri hesum er, at fyribilssettir aðalstjórar eru undir størri trýsti enn fastsettir aðalstjórar.

## Høvuðsevni 2: Áramálssetanir

Nógv tann størsti parturin av luttakarunum í samrøðunum mettu, at grundarlag er fyri at gera áramálssetanir heldur enn fastar setanir. Luttakararnir síggja fyrimunir fyri skipanina í sambandi við, at áramálssetanir kunnu vera við til at skapa størri dynamikk og fleksibilitet í skipanina.

Nógvir luttakarar vóru á einum máli um, at eftir tíggju ár eru stór líkindi fyri, at aðalstjórin ikki hevur nøktandi meira at geva í starvinum. Víst varð á, at tað er sunt fyri skipanina, at aðalstjórar í ymisku ráðunum verða natúrliga skiftir út.

Semja var til samrøðurnar um, at um aðalstjórastørvini vórðu áramálssett, hevði loysnin møguliga virkað sum ein gularót og ambitiónsmál fyri einstaka aðalstjóran. Av hesum sama hevði loysnin havt natúrliga útskifting við sær og givið skipanini ein annan dynamikk enn í dag.

Ein luttakari sigur soleiðis: "*Mann kundi fingið aðalastjórar at sæð frá byrjan, at starvið er tíðaravmarkað til eitt nú sjey ár. Tí tá ið tú hevur sitið í einum starvi so og so leingi, byrjar tú at møta tínum avgerðum aftur. Tá kemur tú í ta støðu, at alt annað í samfelagnum koyrir víðari, men skipanin stendur í stað. Tá er betri fyri skipanina og samfelagið sum heild at fáa fornýggilsi í og eitt natúrligt skifti av aðalstjórum.*"

Ein annar luttakari sigur soleiðis: "*Um mann er tíðaravmarkað settur og skipanin leggur upp til, at mann flytir millum aðalstjórastørv ella er áramálssettur, so hevði eingin skomm verið í at flutt niður aftur í eitt annað starv. Og tá hevði kanska verið størri líkindi fyri at blivið stovnsleiðari ella okkurt annað í ymisku ráðunum. Tað hevði kanska eisini verið ein fyrimunur fyri allar partar. Har eru fleiri møguleikar, sum kundu givið góð úrslit.*"

Samrøðurnar geva somuleiðis ábending um, at eitt natúrligari skifti aftan á nøkur ár ger nakað við motivatiónina hjá aðalstjórum. Á sama hátt sum hjá øllum starvsfólkum sum heild, um tey vistu, at eitt natúrligt skifti lá í starvinum.

Fleiri av samrøðunum samanbóru við eigarapolitikkin hjá landinum, har ein nevndarlimur vanliga ikki situr longur enn átta ár og allarhægst 12 ár. Argumentið er, at tá ber ikki til at virka sum óheftur longur.

Tó varð staðiliga víst á í nógvum av samrøðunum, at áramálssetanin ikki má vera ov stutt. Hetta tí at tað tekur rúma tíð at koma inn í starvið. Tað ganga ofta nøkur ár, áðrenn ein aðalstjóri av álvara prógvar sítt virði í starvinum. Tí eigur áramálssetanin ikki at vera ov stutt. Somuleiðis tí, at ov nógvur títtleiki í skiftum av aðalstjórum kann hava við sær ov stóran miss av skipanarvitan, og tað kann vera stórur vansi fyri skipanina sjálva og ikki minst fyri landsstýrisfólkið og politisku skipanina annars.

Í onkrari av samrøðunum varð víst á, at eitt nú í Grønlandi hava tey ringar royndir av, at tá ið tú fært tín sáttmála, so fært tú samstundis tína uppsøgn. Av hesum sama fara fólk mentalt av rigga av aftan á tvey ár, tí at áramálssetanin einans er fýra ár. Tí verður effektiva tíðin í starvinum eisini avmarkað.

Ein av luttakarunum sigur soleiðis: "*Fimm ár er stutt, so tí kundi ein longri áramálssetan verið betri. Eitt nú 8-10 ár. Tað er tó ikki størri garanti fyri, at mann er góður aðalstjóri fyrstu árini av sínari setan, enn tá ið mann hevur fleiri royndir og verið longur í starvinum. Tað kann vera so ymiskt. Tú broytist eisini sjálvur við tíðini, so tað spælir eisini inn. Men fimm ár eru ov stutt til áramálssetanir.*"

Ein annar luttakari greiðir soleiðis frá: "*Tað vigtigasta er, at aðalstjórin følir seg tryggjan, tí hann skal kunna arbeiða og vera ein mótsetningur til landsstýrisfólkið. Um mann bert situr eitt nú fýra ár, so hugsar mann bara fimm ár fram. Ein áramálssettur hugsar sum heild stuttsiktað. Viðkomandi roynir at*

*gera eitt gott intrykk, og um landsstýrisfólkinum ikki dámar ein, so fer mann tíðliga í prosessini at leita sær eftir onkrum øðrum. Tí haldi eg, at tað er vigtigt, at ein aðalstjóri hugsar longri enn fimm ár.*"

Nakrar av samrøðunum løgdu dent á, at um farið verður yvir til áramálssetan, eigur at verða lagt upp fyri onkrum slagi av trygdarneti, sum verður bygt inn í skipanina. Hetta fyri at gera leiklutin attraktivari. Talan kundi eitt nú verið um eina samansetta loysn, har setanin er áramálssett, men har aðalstjórin varðveitir tænastumannasetanina og fær teir ágóðar, sum fylgja við henni. Tað kundi eitt nú verið eitt ískoyti fyri, at viðkomandi er áramálssettur.

Hetta kundi verið eitt alternativ til fasta varandi setan. Tó eigur at verða hildið fast um, at áramálssetanin ikki er ov stutt, tí tá er størri vansi fyri at missa skipanarvitan, trygd og samanhang í starvinum.

Fleiri av samrøðunum løgdu upp til eina áramálssetan, sum er avmarkað til í mesta lagi 10 ár. Aftan á hetta eigur eitt slag av trygdarneti at liggja inni í skipanini, sum tryggjar aðalstjóranum alternativ til onnur viðkomandi størv sum eitt nú stovnsleiðari ella ráðgevi.

Ein luttakari greiðir soleiðis frá:"*Áramálssetanin kundi eitt nú verið 10 ár, og so eiga teir at rotera aftan á hetta. Politikarar eru tryggheitsnarkomanar og vilja gjarna hava eitt stabilt system. Tí átti roteringin ikki at fylgt valinum ella stjórnarskiftinum. Um mann innførdi hetta nokk so skjótt, so hevði hetta dryppað positivt niður víðari í systemið … Mann kann siga, at um ein aðalstjóri hevur hildið í 10 ár, so er tað eitt slag av góðskutrygging, tí hann hevur gjørt okkurt rætt, tá ið hann hevur hildið út í 10 ár. Mann kann siga, at hann er burdardyggur á ein hátt. Ein góðskutrygging."*

Fleiri av samrøðunum argumentera fyri, at um aðalstjórar vita frá byrjan, at setanin er áramálssett, so vita teir sjálvir, landsstýrisfólk og starvsfólk tað og kunnu skipa seg við støði í hesari fortreyt. Hetta meta fleiri luttakarar vera sunt fyri skipanina og kann bøta um eina stirvna skipan. Ein luttakari orðar seg soleiðis: *"Mann kann koyra inn í sáttálan, at mann kann tryggja fólk upp á ein annan máta og ikki leggur upp til eitt lívsstarv. Sum ein vanlig kontrakt, sum ikki er ein tænastumannaskipan, men sum tekur hædd fyri somu verjuni, sum í einari tænastumannasetan. Tí blívur rekrutteringsparturin eisini so avgerandi."*

## Høvuðsevni 3: Lønarviðurskifti

Ein stórur partur av luttakarunum var á einum máli um, at motivatiónin fyri starvinum sum aðalstjóri eru uppgávurnar og politiska spælið – og ikki lønin. Ein av luttakarunum sigur soleiðis: "*Eg haldi, at lønin er nøktandi. Men eg havi alla tíðina verið erligur um, at eg eri ikki í starvinum vegna lønina, men tí eg haldi, at tað er spennandi.*" Ein annar luttari greiðir soleiðis frá: "*Eg haldi, at lønin er góð, og eg hugsi ikki nógv um løn. Eg hugsi meira um spennandi uppgávur og at hava eitt landsstýrisfólk, sum eg kann lata væl í. Tað er stuttligt at hava ambitiøsar og góðar politikarar, sum gera nøkur ting, sum eg eri við til at hava ávirkan á. Tað er tað, sum gevur mær orku, meira enn lønin. Eg veit ikki, um tað hevði broytt tað stóra, um eg fekk 10.000 kr. meira um mánaðan.*"

Tað, sum gekk aftur í samrøðunum, var í stóran mun, at treytirnar í tænastumannasetanini viga upp móti lønarlagnum. Nógv tey flestu mettu av hesum sama ikki, at lønin er ov lág, tá ið heildin við samlaðu treytunum verður tikin við. Tó vístu fleiri á, at væl kundi verið argumenterað fyri, at eitt nú ein sjúkrahússtjóri átti at ligið hægri í mun til ábyrgd.

Ein av luttakarunum sigur soleiðis: "*Summi hava ta fatan, at lønin hjá aðalstjórum er ov lág í mun til ábyrgd, trýst og sárbarheit. Mann hevur nógv at gera, mann arbeiðir nógv um kvøldarnar og tað er eitt rímiliga krevjandi starv. Eg eri ikki har, at eg haldi, at aðalstjórar eiga at tjena mest í systeminum. Eitt nú kundi mann argumenterað fyri, at summir stovnsstjórar áttu at ligið hægri. Eisini tí, at stovnsstjórar eru frontfigurar, meðan aðalstjórar eru umboð aftanfyri eitt landsstýrisfólk.*"

Tað er nøkur heilt fá, sum liggja á stigi 39. Talan er um aðalstjórar og nøkur heilt fá aftrat. Aðalstjóraviðbótin er 5.898 krónur. Umrøða hevur ongantíð verið um, hvørt viðbótin átti at verið vigað upp ímóti, hvussu stórum aðalráði aðalstjórin hevur ábyrgd av. Tað ber í praksis til at broyta hetta, tí viðbótin ávirkar ikki eftirlønarviðbótina. Summar av samrøðunum løgdu upp til, at tað møguliga hevði verið eitt hugskot at hugt at hesum, um tørvur er á at fara inn nakrastaðni at broyta lønarløg.

Einstakir luttakarar nevndu í samrøðunum, at lønin eigur at vera meira kappingarfør, enn hon er í dag. Millum annað varð samanborið við Danmark, har aðalstjórin oftast fær væl hægri løn enn ráðharrin. Harafturat hava aðalstjórar ymiskar møguleikar í boði, um teir fara úr leiklutinum sum aðalstjóri. Ein av luttakarunum greiðir soleiðis frá: "*Lønarlagið kundi verið hægri. Mann kundi eitt nú gjørt aðalstjóraviðbótina størri ella betrað um eftirlønarskipanina. Í øðrum londum hevur mann øðrvísi modell. Eitt nú við høgari grundløn, høgari viðbót,*

*møguleika fyri at forhandla og so eina eftirløn omaná. Harafturat liggur aðalstjórin ofta hægri enn ministarar og ráðharrar."*

Aðrar samrøður vístu á, at eftirlønarskipanin hjá aðalstjórum er ein trupulleiki og grund til, at nógvir aðalstjórar halda so leingi út í starvinum. Tey meta, at ein vanlig eftirlønarskipan hevði verið sunnari á tann hátt, at teir pengarnir kundu verið lagdir oman á lønina í staðin. Fleiri vístu á, at eftirlønarviðbótin er stór og góð, men skal helst ikki gerast ein sovipúta fyri at verða hangandi í starvinum. Ein greiðir soleiðis frá: "*Aðalastjórastarvið inniber, at tú torir at geva mótspæl og at siga tína meining. Men tað skalt tú tora óansæð, um tú fært eina góða pensjón ella ikki.*"

## Høvuðsevni 4: Almenna í mun til tað privata

Í einum parti av samrøðunum varð mett, at tað ber væl til at koma lætt inn í starvið sum aðalstjóri úr privatu vinnuni. Hetta kundu eitt nú verið fólk úr vinnulívinum ella granskingarumhvørvinum. Argumentini eru, at høvuðsuppgávan hjá einum aðalstjóra er at vera leiðari, og av hesum sama gongur nógv aftur – so sum at leggja til rættis, stíla fyri, leiðsla, starvsfólkaleiðsla, tilgongdir og annað.

Tó var størsti parturin av samrøðunum á einum máli um, at almenni og privati geirin er púra hvør sín heimur. Tí kann ein og hvør úr privatu vinnuni ikki koma lættliga í starvið. Talan er ofta um hvør sín heim. Eitt av argumentunum eru, at fólki úr privatu vinnuni ofta dámar væl dynamikk, og tey eru von við heilt aðrar arbeiðsuppgávur og endamál. Tí er ikki sannlíkt, at toppfólk úr privatu vinnuni hava áhuga fyri at søkja aðalstjórastørv.

Ein greiðir soleiðis frá: "*Eg ivist í, at tað er nokk at hava leiðsluroyndir til aðalstjórastarvið, um tú ikki dugir spælið. Tú kanst koma galið í býin, um tú ikki kennir spælireglurnar, sum liggja um leiklutin ... Um eitt øki til dømis hevur trý høvuðsvitanarøkir, so mást tú í øllum førum duga eitt ordiliga væl. Og um tú ikki gert tað, so ert tú på herrens mark. Og tá er trupult at hava leiðsluábyrgd av 10 fólkum, um tú ikki hevur nóg góða fakliga vitan. Um tú hevði størri aðalaráð enn tey føroysku, so hevði tað kanska havt enn størri týdning at hava nógvar leidsluroyndir.*"

Eitt annað argument frá samrøðunum var, at tað er nógv at læra. Tað hevur púra hvør sítt endamál at vera stjóri í tí privata og tí almenna. Sum aðalstjóri er týdningarmikið at hava politiskt tev og duga at telva nøkur spøl fram alla tíðina.

Ein lýsir tað soleiðis: "*Tað tekur eina rúma tíð at koma inn í leiklutin. Tað er nógv systemvitan í systeminum, og tað er nógv systemvitan, sum aðalstjórar skulu læra*

*seg og kenna. Mentanin er nógv bestemmað av, at tað eru nógv fólk, sum hava verið her leingi. Og um tú kemur inn sum aðalstjóri og ikki hevur eina baggasju við tær (frá eitt nú almenna sektorinum), so er tað op ad bakke. Tú hevur so nógv betri fortreytir at fylla leiklutin sum aðalstjóri, um tú hevur systemvitan við tær … Tað snýr seg um at skilja rolluna at vera lús millum tvær negl. Tú lærir teg ta rolluna, og tá ið tú dugir hana, er lættari at flyta seg í eitt annað fakøki. Tað er trupult at koma inn í hetta fakøkið frá tí privatu vinnuni, um tú ikki skilir hasa rolluna.*"

Ein annar luttakari greiðir soleiðis frá: "*Eg ivist í, um tað riggar fyri ein úr tí privata at koma inn í tað almenna. Tað er eitt sindur sum at fáa ein fíl inn í eitt glasbúr. Tað er púra hvør sítt … Eg ivist í, um ein góður stjóri úr tí privata hevði dugað hetta spælið í tí almenna, har mann skal fyrihalda seg til nøkur heilt onnur ting, so sum innlit, lóg og fyrisiting … Starvið er av einum øðrum slagi, og tað er ikki tú, sum bestemmar. Ert tú stjóri í tí privata, ert tú vanur við at taka avgerðirnar og seta kósina (saman við einari nevnd). Tað sleppur tú ikki sum aðalstjóri, tí tú stendur aftan fyri landsstýrisfólkið.*"

## Høvuðsevni 5: Alternativ til aðalstjórastarvið

Eitt evni, ið gekk aftur í mestsum øllum samrøðunum, var, at lítið og einki alternativ er til teirra, ið vilja í onnur tilsvarandi størv frá aðalstjórastarvinum.

Av hesum sama hava vit eina skipan, har fólk koma inn og sita, inntil tey raka fráfaringaraldur. Sannlíkt tí at tey ikki hava onnur alternativ. Seinastu tíðini hevur verið nakað av útskifting, men fyri bara fáum árum síðan høvdu øll sitið sera leingi. Ein av luttakarunum sigur soleiðis: "*Arbeiðsmarknaðurin er so lítil. Tá ið tú hevur verið aðalstjóri í 10 ár, hvat skalt tú so gera aftan á tað?*"

Nógvar av samrøðunum falla aftur á evnið um tignina í starvinum, og at tað kann kennast skammiligt at fara úr starvinum aftur, um einki nóg gott alternativ er.

Ein luttakari greiðir soleiðis frá: "*Mann kundi eitt nú brúkt aðalstjórar til nevndararbeiðir ella at blíva formaður/forkvinna í onkrum grunni ella nevnd, sum hevur politiskan týdning. Okkurt arbeiði, sum hevur eitt sindur av tyngd. Tað kundi verið ein motivatiónsfaktorur fyri at fáa aðalstjórar at flyta seg úr stólunum. At geva aðalstjórum ein møguleika at koma burtur úr karrusellini við æruni í hond.*"

Ein annar luttakari greiðir soleiðis frá:"*Tað er øðrvísi, um mann kemur í aðalstjórastarvið sum ungur ella sum eldri. Fara tey ungu at tíma at sita í einum aðalstjórastarvi restina av arbeiðslívinum? Ein roteringsskipan hevði kanska*

*verið við til at skapa ein dynamikk og gera tað meira attraktivt fyri ungu generatiónina eisini.*"

Fleiri av samrøðunum løgdu upp til alternativ. Eitt uppskot er Løgmansskrivstovan, sum møguliga kundi blivið eitt starvsstað við "spesialkonsulentum", sum kundi verið viðkomandi at farið í, tá ið farið verður úr einum aðalstjórastarvi. Eitt annað uppskot er, at fráfarandi aðalstjórar høvdu egnað seg væl sum eitt nú sendifólk.

Tó vístu fleiri á, at starvsfólk eiga ikki at verða sett í starv í einum staði, tí tey ikki rigga aðrastaðni. Ein luttakari orðar seg soleiðis:"*Tað er ringt at siga, tí summir aðalstjórar kundu riggað í eitt nú Uttanríkistænastuni, ímeðan tað eru aðrir aðalstjórar, sum als ikki høvdu riggað har. Men tað kundi eitt nú verið ráðgevarastørv við einari rímiligari løn, har fakligheitin kemur í fokus. Tað kann eisini vera stjórastarv á stovnum, sum er tøkt akkurát tá. Men ein exit-strategi má vera. Tað kann eisini vera ein roteringsskipan."*

Summir av aðalstjórunum vístu á, at teir høvdu havt áhuga fyri at farið í leiklut sum stovnsleiðari ella stjóri aftan á starvið sum aðalstjóri. Ein av grundunum er, at mann hevur eina botnvitan við sær um stovnsrakstur. Tí verður argumenterað fyri, at hugt kundi verið at stovnsstjórum sum talenthópi frá aðalstjórapuljuni.

## Høvuðsevni 6: Hugleiðingar um skipanina og møguleikar fyri rotering

Ein reyður tráður gjøgnum samrøðurnar er, at ein aðalstjóri er sera sentralur í skipanini og ráðnum, sum hann situr í. Hetta tí, at alt í onkran mun gongur ígjøgnum viðkomandi. Tó, soleiðis sum skipanin er í dag, kann vera trupult at tryggja, at vit altíð hava tey røttu fólkini.

Ein av luttakarunum sigur soleiðis: "*At vera tænastumaður gevur eina ávísa trygd í starvinum, men satt at siga er hetta ikki nakað, sum eg havi hugsað yvir. Og hetta er heldur ikki nakað, sum politikarar hugsa um – ikki uttan at tað kemur til skarpskeringar. Vit fara øgiliga langt í skylduni hjá okkum mótvegis politikarum, men eisini til eitt mark. Serliga viss tað kemur til nakað, sum ikki kann forsvarast fakliga. Men eg taki synd í politikarum, tí teir hava einki at arbeiða við, tí eingin rotering er millum aðalstjórar. Skipanin er alt ov stirvin. Tað er so ymiskt, hvussu aðalstjórar eru, tí er skipanin alt ov stirvin. Mann fær ongan dynamikk ella broyting* í."

Sambært samrøðunum er greitt, at natúrligar rotering hevði verið góð fyri skipanina sum heild. Fleiri av samrøðunum løgdu dent á, at ein aðalstjóri, sum

hevur sitið í 10 ár og meira, ikki kemur við nógvum nýggjum. Rotering er ein møguleiki starvsrættarliga, men møguleikin verður ikki brúktur, sum nú er.

Ein av luttakarunum sigur soleiðis: ”*Stórt lop er millum stjóralønir í tí almenna og stjóralønir í tí privata. Men eg trúgvi ikki, at tú fært ein betri almennan sektor, um tú hækkar lønir – men heldur, um tú tryggjar meira rotatión og fornýggilsi.*”

Hvussu fæst dynamikkur í skipanina? Samrøðurnar góvu ábendingar um, at aðalstjórar uttan iva hava førleikar at rotera runt í ráðum. Tað kann vera trupult hjá aðalstjórum at fylgja við, tá ið samfelagið broytist, men skipanin við aðalstjórum er so stirvin, at dynamikkur ikki fæst í.

Ein av luttakarunum greiðir soleiðis frá: ”*Mann hevur kanska eina óhepna óvirkan á onnur, um mann situr ov leingi. Mann kemur ikki við nøkrum nýggjum, og mann fær sín autoritet gjøgnum sína fakligu vitan og ikki sínar ætlanir og visjónir. Tað hevði verið eitt sterkt signal, at mann byrjar við toppinum at rotera runt. Mann má skapa eina trúgv hjá øðrum fyri, at mann kann blíva leiðari/stjóri.*”

Tí vístu fleiri av samrøðunum á, at atlit við tryggleika og dynamikki mugu vigast hvørt upp ímóti øðrum. Aðalstjórar eiga at tola, at teir verða fluttir millum ráð. Fleiri meta eisini, at tað kann vera motiverandi at skifta og fáa nýggjar avbjóðingar. Ein av luttakarunum sigur soleiðis: ”*Fyri føroyska samfelagið kann tað vera ein stórur vandi, at skeivur persónur situr og sovnar í einum stjórastarvi. Tað smittar so nógv niður gjøgnum systemið, og tað kann vera ordiliga farligt og hava stóra ávirkan.*”

Tó varð eisini gjørt greitt í samrøðunum, at ein javnvág má hugsast inn fyri at tryggja skipanarvitanina. Ein luttakari greiðir soleiðis frá: ”*Áramálssetan og roteringar kundu gjørt, at tað kom meira dynamikkur í skipanina. Men tað hevur eisini sínar vandar. Eitt nú, um politikarar gjarna vilja gera nógvar broytingar nokk so skjótt fyrsta árið. Hetta ber ikki til, um mann ikki hevur neyðugu systemvitanina til at gjøgnumføra hetta. Roteringar behøvast tí ikki at vera í sambandi við stjórnarskifti, men eisini verða fastsettat upp á so og so nógv ár. Nógvir aðalstjórar sakna møguleikar at kunna rotera. Tað eru tó nakrir aðalstjórar, sum ikki kunnu rotera. Eitt nú eigur tað at vera ein juristur í løgmálaráðnum. Men hesum kann mann taka hædd fyri í einari roteringsskipan.*”

Nógvar av samrøðunum vístu á, at tað ikki bara er millum aðalstjórar, at roteringin er góð og sunn. Hetta er eisini galdandi í embætisverkinum sum heild. Miðalaldurin í landsfyrisitingini er oman fyri 50 ár. Kanska tí, at starvsfólk trívast – men spurningurin er, um tað eisini er tí, at tey ikki hava aðrastaðni at fara. Tað kann vera trupult at fáa eina roteringsskipan millum embætisfólk, tí lítil og eingin rotatión er millum ráð. Støðan er bert galdandi, tá ið stjórnarskifti er, og tá flyta fólk ofta við sínum ráði og enda við at sita við somu uppgávum sum áðrenn skiftið. Tí merkir broytingin ofta ikki sunn ella fornýggjandi rotatión.

Ein av luttakarunum greiðir soleiðis frá: "*Tá ið fólk koma inn í skipanina, átti mann eisini at havt eina mentorskipan. Eitt nú, at nýggir fulltrúar rotera runt, trý ár her og trý ár har. Tí tá ið mann er ungur og kemur inn, so vil mann gjarna læra og fáa nýggjar uppgávur. Og við rotatión fær mann nógv sterkari fulltrúar. Mann eigur at hava eina rekrutteringsætlan fyri nýggjar fulltrúar við rotatión, tí so fært tú kjarnuna við. Tað broytir ikki nógv bara at flyta aðalastjórar. Um tú ikki fært fólk við, so hendir einki. So mann eigur at fara inn til øll løg við rotatión, um mann vil hava eina minni stirvna skipan.*"

Men víst verður samstundis á, at skipanin er stirvin, tí talan er um fá stjórastørv. Fólk við ambitiónum hava einki at stremba eftir, tí loftið er so greitt. Tú sleppur ikki longri upp, enn skipanin loyvir tær. Ein greiðir soleiðis frá: "*Tað kann vera eitt problem, at tú kanska hevur dugnaligar deildarleiðarar, sum ongantíð sleppa til, tí aðalstjórarnir sita so tungt í størvunum. Tað setur ein stoppkloss fyri karrierumøguleikar. Men um mann hevði møguleika at plasera aðalstjórar aðrastaðni ella hevði eina karrieruútfasing, sum gevur meining fyri aðalstjórar, kundi tað loyst upp í skipanini.*"

## Samanumtøka av fyrimunum og vansum

Sum arbeiðstilgongd í álitinum hevur nevndin skipað eina fakliga og luttakandi tilgongd, sum er sett saman av søguligum tilfari, lýsing av støðuni í londunum uttan um okkum og samrøðum við 15 viðkomandi hoyringspartar. Eftir arbeiðið hjá nevndini eru yvirskipaðar niðurstøður staðfestar. Eitt nú er greitt, at:

- Tað er rætt at halda fast í verandi tænastumannasetan og treytir
- Verandi aðalstjóraskipan er ov stirvin
- Greið undirtøka er fyri, at aðalstjórar verða settir í áramálssett størv
- Greið undirtøka er fyri einari natúrligari rotatiónsskipan fyri aðalstjórar

Sambært hoyringspørtunum hevur løn ikki avgerandi týdning fyri aðalstjórastarvið. Heldur er størsti parturin á einum máli um, at tað hevði verið gott fyri skipanina, um hon var meira dynamisk og fleksibul. Tað kann eitt nú vera við einari meira natúrligari roteringsloysn, sum landsstýrisfólk, aðalstjórar og starvsfólk vóru greið um við starvsbyrjan hjá nýsettum aðalstjórum. Tó, fyri at tryggja støðufesti og samanhang í skipanini og fyri landsstýrisfólk eiga roteringar ikki at fylgja valinum ella stjórnarskiftinum. Eisini er undirtøka fyri at hugsa eina tílíka loysn inn í samlaða embætisverkið soleiðis, at tað gerst natúrligari hjá embætisfólkum eisini at rotera millum ábyrgdarøkir, ráð og leiklutir.

Í úrslitinum frá arbeiðinum hjá nevndini er greitt, at trygdin við tænastumannasetanini hevur stóran týdning. Tí leggja hoyringspartar dent á, at

tað eigur at verða hildið fast um hesar setanartreytir við tænastumannasetan. Tó metti nógv tann størsti parturin av luttakarunum í samrøðunum, at grundarlag er fyri at gera áramálssetanir heldur enn fastar setanir. Luttakararnir sóu fyrimunir fyri skipanina í tann hátt, at áramálssetanir kunnu vera við til at geva størri dynamikk og fleksibilitet í skipanina. Nógvir luttakarar vóru á einum máli um, at eftir tíggju ár vóru sannlíkindi fyri, at aðalstjórin ikki hevði nøktandi meira at geva í leiklutinum.

Eitt úrslit av arbeiðinum hjá nevndini er somuleiðis, at tað er umráðandi at hugsa alternativ inn fyri, hvørji størv aðalstjórar kunnu fara í eftir starvsenda.

## Tilmæli nevndarinnar

Við støði í arbeiðinum hjá nevndini, og samrøðum við samanlagt 15 hoyringspartar, mælir nevndin til, at aðalstjórar framhaldandi verða settir sambært Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 6. mai 2022 við niðanfyri standandi broyting:

Nevndin mælir til, at

- Aðalstjórar verða settir upp á áramál í 7 ár sum tænastumenn í lønarflokki 39 við einum aðalstjóraískoyti umframt einum áramálsískoyti upp á 20%.

- Áramálssetanin kann verða longd við trimum árum.

- Starvsviðurskifti hjá verandi aðalstjórum verða óbroytt. Tó kunnu verandi aðalstjórar fáa møguleika at flyta yvir til nýggju skipanina, um ynski er um hetta.

- Verandi aðalstjórar, sum ynskja at fara yvir at gerast áramálssettir, verða settir eftir somu treytum, sum nýsettir aðalstjórar.

- Nýsettir aðalstjórar skulu hava rætt til fráfaringarløn eins og landsstýrisfólk: Fráfaringarlønin er 6 mánaðir løn. Virðið av møguligari aðrari inntøku í fráfaringartíðarskeiðnum verður drigið frá fráfaringarlønini eftir nærri reglum.

- Starvsfólk, sum eru í starvi hjá landinum, og sum verður sett sum aðalstjóri, skulu hava rætt til farloyvi úr starvi sínum.

Meðan samrøðurnar hava víst, at flestu aðalstjórar halda, at lønirnar hjá aðalstjórum eru nøktandi, hava nakrir aðalstjórar víst á, at lønirnar eru ov lágar. Bæði tá ið hugsað verður um lønarstøðið hjá aðalstjórum í øðrum londum, og tá ið hugsað verður um stjóralønir í privatu vinnuni.

Nevndin hevur valt ikki at mæla til at broyta verandi lønartalvu hjá aðalstjórum, men vísir á, at landsstýrið hevur møguleika at broyta viðbótina hjá aðalstjórum, um mett verður, at lønin ikki samsvarar ta ábyrgd og tign, starvið hevur, ella um lønin ikki er kappingarfør við lønarlagið í privatu vinnuni av líknandi størvum.

Havast skal eisini í huga, at ein skipan við áramálssetan førir við sær, at eitt áramálsískoyti skal latast. Nevndin skýtur upp, at áramálsískoytið verður sett til 20%. Hetta inniber, at lønin hjá aðalstjórum hækkar munandi.

Nevndin vísir á, at rotering longu er ein starvsrættaligur møguleiki millum aðalstjórar og í embætisverkinum sum heild. Nevndin metir, at um aðalstjórastørvini eru áramálsett, fer broytingin at hava eina natúrliga útskifting við sær og leggja lunnar undir eina meira dynamiska skipan við natúrligari útskifting og rotering millum aðalstjórar og í embætisverkinum sum heild.

## *Fylgiskjal*

**Samrøðuskjal**

Handan samrøðuskjalið er nevnd, sum er sett at kanna setanarviðurskiftini hjá aðalstjórum. Í arbeiðinum skal nevndin í sínum tilmælum, umframt at leggja áherðslu á setanartreytir og løn, leggja áherðslu á viðurskifti og umstøður, sum stjórarnir virka undir og hvussu hesar kunnu betrast, soleiðis at karmarnir fyri almennari leiðslu verða styrktir.

Samrøðuskjalið verður yvirskipað ramma fyri samrøðuna. Hetta merkir, at samrøðan tekur støði í spurningunum í samrøðuskjalinum, men at luttakarin í stóran mun fær møguleika at leggja dent á evnir, ið viðkomandi ynskir at fáa fram í samrøðuni.

Yvirskipaða ramman um samrøðurnar tekur støði í hesum spurningum:

1. Kanst tú greiða frá tínari tíð sum aðalstjóri?

2. Kanst tú hugleiða um fyrimunir og vansar við tíðaravmarkaðari áramál setan í mun til fasta tænastumannasetan fyri aðalstjórar?

3. Hvussu metir tú, at umstøður hjá aðalstjórum eru í mun til eitt nú setanartreytir og løn?

4. Eru onnur viðurskifti í leiklutinum sum aðalstjóri, ið tú ynskir at greiða frá ella hugleiða um?